# ARB-Vegleiðing

# V-A008-2

**Trygdarútbúgving um arbeiðsumhvørvi**

# 2004/03

# Arbeiðseftirlitið

## Hvat er ein ARB-Vegleiðing?

ARB-vegleiðingar vegleiða um hvussu reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini skulu skiljast/tulkast. ARB-vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum (lóg og kunngerðir),
- greiða frá hvussu krøvini í reglunum kunna lúkast í royndum,
- greiða frá vitan um tulkingar av reglunum í samband við dómar,
- greiða frá hvussu arbeiðsumhvørvislógin er samansett og hvørji øki hon umfatar.

## Er ein ARB-vegleiðing bindandi?

ARB-vegleiðingar eru ikki bindandi fyri virkir, trygdarskipan e.o., men vegleiðingarnar eru skrivaðar út frá reglum (lóg og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðseftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskila í eini vegleiðing.

Virkini kunna loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðseftirlitið vil tá meta um, um hesin háttur er líka so tryggur og í trá við reglurnar.

**Arbeiðseftirlitið**
**Boks 1134**
**FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: + 298 357811**
**Fax.: + 298 357810**
**T-post.: arb@arb.fo**
**Heimasíða: www.arb.fo**

***Innihaldsyvirlit.***

Evni: Síða:

1. Fororð …………………………………………………………………… 4
2. Endamál ………………………………………………………………... 5
3. Tilmelding …………………………………………………………… 5
4. Trygdarútbúgvingin alment ………………………………………… 5
5. Endamál við útbúgvingini …………………………………………… 5
6. Innihaldið av útbúgvingini …………………………………………... 6
7. Pedagogiskar grundreglur …………………………………………… 6
8. Undirvísingartilfar ………………………………………………… 7
9. Krøv til undirvísarar ………………………………………………. 7
10. Skeiðluttøka, luttakaratal v.m. ...……………………………………... 8
11. Prógv ………………………………………………………………… 8
12. Fígging ……………………………………………………………… 8



# *1. Fororð.*

***Trygdarútbúgving***
Arbeiðsgevarin hevur skyldu jb.:

- Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, kap. 2
- Kunngerð nr. 126 frá 4. september 1995 um trygdararbeiði á virkjum og arbeiðsplássum,
- Kunngerð nr. 127 frá 4. september 1995 um trygdarskeið,

at síggja til, at limir í trygdarbólkum, trygdarnevndum og dagligi leiðarin av trygdararbeiðinum, fáa høvi til at nema sær neyðuga útbúgving og kunnleika til trygdar- og heilsuligar spurningar og kallast útbúgvingin **Trygdarútbúgvingin (TÚ)**

Í kunngerð nr. 127 frá 4. september 1995 um trygdarskeið eru ásetingar um minstu krøvini til útbúgvingina, herundir reglur um tíðarbrúkið til útbúgvingina og at Arbeiðseftirlitið saman við Arbeiðsumhvørvisráðnum, ger reglur fyri hvussu innihaldið á skeiðunum skal vera og hvørji krøv skulu setast til lærarar.

Heimild fyri útbúgving av limum í trygdarskipanini er í Ll. nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi § 7, stk. 1 nr. 4 og § 8, stk. 2.
Sjá eisini sum nevnt niðanfyri undir Trygdarskipanin.

**Endamálið við løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi**
Lógin er tilevnað sum ein rammulóg og merkir tað, at neyvari reglur í tráð við teknisku- og sosialu menningina í samfelagnum, verða settar við tíðarhóskandi kunngerðum.

Endamálið við lógini er jb. § 1, at:

1. virka fyri einum tryggum- og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóð við teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum,
2. skapa grundarlag fyri at virkini sjálvi kunna loysa trygdar- og heilsuspurningar eftir vegleiðing og í samstarvi við feløgini á arbeiðsmarknaðinum og við vegleiðing og undir eftirliti av Arbeiðseftirlitinum.

***Trygdarskipanin.***
Landsstýrismaðurin kann jb. § 7, áseta nærri reglur um bygnaðin og virksemið hjá einum virki viðvíkjandi arbeiði inna trygd og fyribyrging av heilsuvandum t.d. reglur um:
1) val av trygdarumboðum,
2) rættindi og skyldur hjá trygdarumboðum,
3) stovnan av trygdarbólkum, trygdarnevndum og arbeiðsøkjum teirra,
4) útbúgving hjá limunum í trygdarskipanini,
5) tað dagligu leiðsluna av trygdararbeiðinum.

Henda vegleiðing hevur verið til ummælis hjá Arbeiðsumhvørvisráðnum.

Arbeiðseftirlitið, 12. mars 2004

________________________
Karl Joensen, stjóri (sign.)

## *2.Endamál.*

Við trygdarútbúgving (TÚ) er at skilja tann útbúgving ella vitan, ið fólk í trygdarskipanini skulu hava fyri at útinna teirra virksemi í trygdararbeiðinum.
Útbúgvingin hevur við øðrum orðum til endamáls, at læra tey luttakandi, hvussu tey í royndum og í samstarvi við onnur kunna fremja eitt trygt og heilsugott arbeiðsumhvørvi á teirra egna arbeiðsplássi, sambært kunngerð um trygdararbeiði á virkjum.

## *3. Tilmelding.*

Tilmelding, til eitt av Arbeiðseftirlitinum góðkent trygdarskeið, skal gerast av arbeiðsgevaranum, í seinasta lagi 4 vikur aftaná trygdarbólkur er skipaður, ella tá nýval er farið fram í trygdarskipanini.

## *4. Trygdarútbúgvingin alment.*

Niðanfyri er víst, hvussu útbúgvingin er skipað, endamál, innihald og pedagogiskar grundreglur o.a..
Tað eru tvey sløg av skeiðum:

- Eitt skeið fyri ídnað, handverk v.m. (min. 24 tímar) og
- eitt skeið fyri handil og skrivstovur, dagstovnar, skúlar v.m. (min. 18 tímar).

## *5. Endamálið við útbúgvingini.*

Útbúgvingin hevur til endamáls at læra tey luttakandi, hvussu tey í royndum og í samstarvi við onnur kunna fremja eitt trygt og heilsugott arbeiðsumhvørvi á teirra arbeiðsplássi.

Fyri at náa hetta mál skulu luttakararnir:

- kunna ímynda sær sítt virki sum ávikavist arbeiðsleiðari og trygdarumboð í trygdarbólkinum og somuleiðis taka støðu til sítt egna virksemi í hesum høpi.

- kunna leita sær kunnleika í galdandi lógum og reglum hjá myndugleikum og á virkinum, og kunna nýta hendan kunnleika í royndum.

- kunna verða við til at greina viðurskiftir innan arbeiðsumhvørvi í sínum egna virki og at gera uppskot til betring av hesum umstøðum.

- ávirka tann einstaka arbeiðsfelaga á ymsan hátt, til at betra hugburðin til frama fyri trygd og heilsu.

- kunna hava eftirlit við arbeiðsháttum, herundir at teknisk hjálpartól, persónlig trygdarútgerð og evni og tilfar nýtast trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt, og at neyðug vegleiðing verður givin.

- seta fram krøv/ynski í trygdarbólkinum, sum kunna verða við til at fremja eitt gott arbeiðsumhvørvi og at kunna meta um hvussu hetta roynist.

- nýta samskifti, samstarv og samráðingar sum amboð til at fremja samspæli millum trygdarskipanina, virkisleiðsluna, samarbeiðsnevndina v.m.

- samskipa omanfyristandandi mál soleiðis, at trygdarbólkurin virkin kann luttaka í tí fyribyrgjandi arbeiðinum á virkinum innan trygd og heilsu, bæði uppá styttri og longri sikt.

## *6. Innihaldið av útbúgvingini.*

Fyri at náa endamálinum, er tað umráðandi at skeiðstilfarið er soleiðis tilevnað, at luttakararnir fáa:

- Innlit í, hvørjar arbeiðsuppgávur trygdarbólkurin hevur við atliti til kunngerðina um trygdararbeiði á virkjum.
- Kunnleika til rættindir, skyldur og ábyrgd hjá leiðsluni, trygdarbólkinum og arbeiðsfólkunum.
- Kunnleika til restina av trygdarskipanini.
- Kunnleika til, hvar hjálp og vitan er at finna, við at leita í verandi tilfari og ráðgeving av serkønum.
- Eitt upplivilsi av og eina fasta trúgv uppá at kunna klára uppgávurnar.
- Eina vissu um, at arbeiðsumhvørvisarbeiðið hevur ein avgerandi týdning fyri virkið og starvsfólkini.

Fyri at trygdarskipanin kann loysa sína uppgávu til lítar er neyðugt, at hesi fáa eitt grundskeið, ið umfatar:

1. Kunning um galdandi lóg og forskriftir innan arbeiðsumhvørvi, herundir øki, bygnað og fyrisiting.
2. Kunning um skyldur, ábyrgd og revsing, bæði fyri arbeiðsgevara, arbeiðsleiðarunum arbeiðsfólki, útvegarar, innleggjarar, umvælarar, ráðleggjarum o.o.
3. Kunning um bygnað av trygdarskipanini, uppgávur, skyldur og ábyrgd
4. Kunning um samstarv og ráðlegging av arbeiðsumhvørvinum
5. Kunning um innrætting av arbeiðsplássinum
6. Kunning um arbeiðsumhvørvisárin
7. Kunning um arbeiðstøða og ergonomi
8. Kunning um teknisk hjálpartól, flutning, trukkar, kranar v.m
9. Kunning um vandamikil "evni og tilfar"
10. Kunning um inniluft, hitaviðurskifti, ljós, óljóð, gjóstur v.m.
11. Kunning um serlig arbeiðsklæðir og persónliga verndarútgerð
12. Kunning um fyribyrging av arbeiðsskaðum og vinnuligum sjúkum
13. Kunning um sálarligt arbeiðsumhvørvi

## *7. Pedagogiskar grundreglur í samband við útbúgvingina.*

Útbúgvingin byggir á fylgjandi pedagogiskar grundreglur:

- At skeiðleiðarin hevur ábyrgdina av tilrættaleggingini av teimum einstøku skeiðunum innan tær givnu rammurnar og ásettu endamálini
- At fáa motivera skeiðsluttakararnar til at arbeiða við arbeiðsumhvørvisspurningum.
- At læran um lóg og reglur verða ein partur av uppgávuviðgerðini.

- At vekt verður løgd á, at næmingarnir luttaka aktivt í frálæruni heldur enn passiva undirvísing.
- At skeiðið inniheldur venjing í nýtslu av lógum, kunngerðum, reglugerðum, leiðbeiningum v.m. innan arbeiðsumhvørvisviðurskifti.

## *8. Undirvísingartilfar.*

Tað útflýggjaða tilfari er lógin og viðkomandi kunngerðir og reglur frá Arbeiðseftirlitinum. Hartil kemur so skeiðsmappa við skiljubløðum, skriviblokkur og pennur. Eisini fáa luttakararnir einstakar uppgávur og skjøl.

Skeiðleiðarin skal syrgja fyri viðkomandi lógarsavni og regluverki innan arbeiðsumhvørvi Skeiðleiðarin skal eisini ráða yvir øðrum tilfari s.s. UV-tól (uppvørpu, videoframvísara, sjónvarp v.m.), flip-over, speed-markers v.m.

Undirvísarnir arbeiða og leggja tilrættis í tráð við undirvísingarleiðbeiningina, hartil hoyrandi skjøl og í samráð við skeiðleiðarin.

Hølini skulu lúka almennar treytir frá ymsum myndugleikum, s.s. Arbeiðseftirlitinum, Brunaumsjón Landsins o.ø., um undirvísingarhøli.

## *9. Krøv til skeiðleiðarar á trygdarskeiðum.*

Útbúgvingarnar skulu leiðast av einum skeiðleiðara, ið hevur gjøgnumgingið eina til endamálið tilevnaða undirvísaraútbúgving.
Fyri at blíva góðkendur sum skeiðleiðari skulu fylgjandi krøv verða lokin:

- Prógvaðan kunnleika til arbeiðsumhvørvisøkið við luttøku á einum trygdarskeiði og/ella í einum víðkaðum arbeiðsumhvørvisútbúgving
- Luttikið í praktiskum arbeiði innan arbeiðsumhvørvi, t.d. limur í einum trygdarbólki
- Neyvan kunnleika til viðurskiftir á arbeiðsplássum
- Tikið eina pedagogiska útbúgving uppá í minsta lagi 120 tímar, í seinasta lagi 18 mánaðir eftir at viðkomandi er byrjaður at undirvísa, og harumframt hava týðandi royndir í undirvísing
- Luttaka í árligum eftirútbúgvingarseminarum.

Útbúgving og eftirútbúgving av skeiðleiðarum verður framd í samstarvi við Arbeiðseftirlitið.

## *10. Skeiðluttøka, luttakaratal v.m.*

Skeiðini eru vanliga skipaði í flokkum við 12-18 luttakarum, men kunna haldast við 25 luttakarum, í einstøkum førum.

Ein skeiðluttakari, sum hevur havt forfall í meira enn 15% av samlaðu skeiðtíðini, má byrja av nýggjum á einum tilsvarandi skeiði skjótast gjørligt.

## *11. Prógv.*

Arbeiðseftirlitið skrásetir skeiðluttakarnar og skrivar út prógv, sambært lista frá skeiðleiðaranum.
Skeiðleiðarin undirskrivar prógvini, sum luttakararnir fáa handað, tá skeiðið er lokið.
Skeiðleiðarin sendir avrit av skeiðpróvnum til Arbeiðsgevarin.

## *12. Fígging.*

Arbeiðsgevarin ber útreiðslurnar, ið standast av virksemi hjá trygdarumboði jb. løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi §9, stk. 1.
Hetta skal skyljast soleiðis, at arbeiðsgevarin hevur skyldu at rinda allar útreiðslur og møguligan inntøkumiss, sum trygdarumboði hevur í samband við skeiðluttøkuna